gult cyan magenta svart



## DAGSINS MEINING

# Propaganda

Tað er altíð gott at fáa konstruktivan kritikk, men eisini er læruríkt, um enn eitt sindur hugstoytt, at fáa slíkan kritikk, sum ein løgtingslimur Tjóðveldisfloksins borðreiddi við í blaðnum í gjár.

Propaganda, sum vit her á blaðnum verða løgd undir at føra, er eyðkent við at fara fram í totaliterum londum, har tankaeinsrættan er málið. Propaganda, sum vanliga er statsfíggjað, kann vera úttalilsi, sum at »okkara arbeiðið er fullkomið, mótparturin hevur allan feilin«, »sannleikin er…….«, »Vit gera so og so í mun til onnur sum tiga alt burtur og fjala«. Propaganda – søguliga sæð eitt nationalistiskt amboð - er við øðrum orðum ein niðurgeran av øðrum fyri at forherliga seg sjálvan ella í øvugtari raðfylgju. Propaganda ber ikki til uttan sterkan statssensur, eftirsum kritisk fjølmiðlaviðgerð sær ígjøgnum slíkt.

Um t. d. ein statsfíggjað subjektiv heimasíða innihaldandi politiskar greinar, sum í sær sjálvum er eitt sera ivasamt tiltak, var einasta loyvda endurgeving av politikkinum hjá einum stýri uttan eina konstruktivt kritiska pressu, so hevði man eina støðu, har øll kundu havt eina meining, so leingi hon var tað sama sum tann hjá stýrinum.

Ein forðing hjá politiskum einsrættarum er ofta søgan. Fólk minnast tíbetur nøkur ár aftur í tíðina, soleiðis at politiskar eftirrationaliseringar einans einsrætta tey ungu, ið ikki sjálv minnast.

Tjóðveldisflokkurin hevur víst ein sjáldsaman mangul uppá sjálvkritisk evni í hesum valskeiðnum, og ein ikki minni sjáldsaman og ikki sørt órógvandi tendens til at revidera søguna. Nógv verður tosað um 80'ini og onkur løgtingslimur úr Tjvfl, ið eftir øllum at døma ikki befattar seg við banalitetir sum rættartrygd og fyrningarfreistir, hevur tosað um ákæruvald og revsing. Vit loyva okkum at minna á – og tað kann vera, at onkur fer at rópa ein slíkan upplýsing ósakligan – at tann av stóru flokkunum, ið sat longst í Tinganesi í 80'unum, var eingin minni enn sjálvsami Tjóðveldisflokkurin.

Vit á Sosialinum eru ikki feilfrí, men ein fjølmiðil má eftir førimuni royna at lýsa eitt mál frá fleiri síðum, og í summum førum stendur orð móti orði, sum til dømis millum Signar á Brúnni og Høgna Hoydal. Í einari sovorðnari støðu er einki annað at gera enn at endurgeva bæði sjónarmiðini so væl sum man kann. Sosialurin fer ikki uttan prógv at kalla ein av mest royndu politikarum í Føroyum fyri lygnara, bert tí at ein av hansara floksfeløgum ódokumenterað sigur tað – Sosialurin kann endurgeva viðkomandi, men kann ikki uttan prógv seta seg sum dómara. Føroya mest citeraði maður – eisini í Sosialinum – má vera varaløgmaður, men tjóðveldisfólk mugu skilja, at eingin kann monopolisera tíðindaflutingin ella sleppa einsamallur at seta dagsskránna fyri tíðindaflutining - ikki í einum demokratiskum samfelag í ár 2001.

**Sosialurin**

# 80 ára gamli Eskild klippir enn

**Eskild Norðbúð í Klaksvík, sum í dag verður 80 ár, hevur klipt fólki seinastu 60 árini, og hann hevur framvegis salong**

80 ár
*Eyðun Klakstein*

Í dag verður Eskild Norðbúð í Klaksvík 80 ár, men tað forðar honum ikki í at klippa fólki, soleiðis sum hann hevur gjørt ein stóran part av lívi sínum.

Hann hevur framvegis fastar kundar í salongini hjá sær í heiminum Undir Brúnni, og hann ætlar at halda fram, so leingi hann orkar. Hugurin til at arbeiða er framvegis stórur, og prátið gongur lívliga, tá Eskild hevur fólk í salongini.

Eskild var føddur í Klaksvík í 1921, og hann var fimti í røðini av 11 systkjum. Mamma hansara var úr Klaksvík og pápin av Eiði.

Í 1939 syrgdi ein mammubeiggi hansara fyri, at hann kom í læru hjá Valdemar Poulsen í Havn.

– Eg ætlaði mær allatíðina at læra eitt handverk, men tá mammubeggi mín greiddi mær frá hesum plássinum, mutaði eg ímóti. Eg helt fyri, at eg skuldi hava eina útbúgving, sum eg skuldi kunna liva av, greiðir Eskild frá.

Mammubeiggin fekk tó yvirtalað Eskild at fara til Havnar at royna seg, og frá fyrsta degi fekk hann hugin fyri at klippa.

## Fólk bíðaðu eftir tørni

Eskild treivst væl í Havn árini, hann var í læru sum harrafrisør.

– Eg var við í ymsum ítrótti og var millum ungdómin í Havn. Tað dámdi mær sera væl, hóast longsulin eisini var heim til Klaksvíkar, sigur Eskild.

Tá Eskild var útlærdur í 1943 fór aftur til Klaksvíkar, har hann beinanvegin fór at arbeiða. Hann lat upp egna salong í 1943, og hann hevur framvegis slíka.

Fyrstu tvey árini hevði hann salong í Akursmørk, síðandi flutti hann í Víkarnar, og í 1948 flutti hann í hølini heimi við Sandin, har hann klipti fram til 1989.

– Nú ringja fólk til mín og avtala tíð, tá tey skulu koma, men fyrr komu fólk inn, og so sótu tey og bíðaðu til ta_ var teirra tørn. Tað var mangan, at tað vóru nógv fólk inni, og summi bíðaðu leingi, greiðir Eskild frá.

## Sjómenn um kvøldið

Hann klipti dreingjum og monnum, og gentur vórðu eisini kliptar hjá honum til tær komu upp í tannáringa-



árini.

Eskild minnist, at hann plagdi við hvørt at klippa sjómonnum, sum komu heim, um kvøldarnar.

– Vanliga lótu vit upp og aftur stundisliga, men eg hevði latið sjómenninar vita, at komu teir aftur um kvøldið, og skuldu kanska heim á bygd morgunin eftir, so skuldi eg klippa teimum, sigur Eskild.

– Og tað kom meira enn so fyri, at eg klipti eini 10-15 sjómonnum okkurt kvøldið, so teir kundu fara hampulig heim dagin eftir.

## Dámt væl øll árini

Eskild hevði fleiri lærlingar, og ein av teimum var sonurin Anfinn. Teir arbeiddu saman í salongini við Klaksvíksvegin, og eitt skifti stóð Anfinn fyri salongini.

Men tá hann gavst í síðst í áttatiárunum, fekk Eskild sær salong í húsunum Undir Brúnni, har hann var farin at búgva.

Tað er framvegis her, hann býr, og í kjallaranum hevur hann salong, har fólk koma dagliga.

– Nú eru tað mest eldri menn, sum koma at klippa sær hjá mær. Teir plaga at ringja til mín og spyrja, um eg klippi enn. Eg svari, at sjálvandi geri eg tað – hví skuldi eg ikki tað.

– Mær hevur dámt væl arbeiðið øll árini, og mær dámar tað framvegis. Tað er hugaligt at hava við fólk at gera, at klippa teimum og at fáa eitt gott prát. Tað ætli eg mær at halda fram við, sigur Eskild.

## Børn og abbabørn

Eskild er bæði lættur á fótum og lættur í sinni, hóast hann nú hevur ein høgan rundan dag.

Hann hevur seinastu 11 árini verið einkjumaður, eftir at kona hansara, Poulina, sum var av Sandi, doyði. Tey vóru gift í 43 ár.

Eskild eigur tríggjar synir – Jógvan, Sjúrður og Anfinn. – og abbabørnini eru 9 í tali.

Eskild fylgir væl við í tí, sum fer fram í samfelagnum, og fótbólti dámar honum sera væl at hyggja eftir. Hann er fastur fúsur við vøllin í Djúpumýri, tá KÍ spælir.

Eskild heldur føðingardagin í Havn saman við teimum nærmastu.


**Tøkk**

Hjartaliga takka vit tykkum, sum sýndu samkenslu
tá góða mamma, vermamma,
omma og langomma okkara

**Soffy Mikkelsen**

andaðist og varð jarðað. Tøkk til tykkum, sum
hjálptu til í samband við jarðarferðina.
Tøkk fyri blómur og kransar og tøkk
til tykkum øll, sum fylgdu henni til hennara
seinasta hvíldarstað.

*fyri tey avvarandi*
**Emmely og Carl**



†

Okkara elskaða mamma, vermamma, omma,
langomma og olduromma

**Anna Sofía Jacobsen**

andaðist í heiminum 17. januar 2001
100 ára gomul.
Jarðarferðin verður **úr Ebenezer**
sunnudagin kl. 14.00

*Familjunnar vegna*
**Thurid**



Sosialurin

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:**
Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:**
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Tíðindaleiðari:**
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Marjun Dalsgaard marjun@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo

John Johannessen john@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
**Mentan:**
Birgir Kruse birgir@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo

**Útgevari/uppseting:**
Sp/f Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað
mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254mm breið og 346mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.




# Ivasamt um breiðbandsinternet loysir seg



*Telefeløgini í Føroyum eru ójøvn á máli um tað loysir seg at gera iløgur í breiðbandsinternet, sum millum annað ger tað møguligt at fáa filmar heim í stovuna beinleiðis um internetið.*

**Føroya Tele ætlar ikki at leypa fram av, nú íslenska fjarskiftisfyritøkan Lina.net kemur til Føroya at kanna møguleikarnar fyri at veita føroyingum breiðbandsinternet. Tað loysir seg ikki, sigur Føroya Tele, men TeleF, sum hevur verið í sambandi við Lina.net, hevur aðra áskoðan**

FJARSKIFTI
*Rúnar Reistrup*

At íslendska fjarskiftisfyritøkan Lina.net í næstum kemur til Føroya at kanna møguleikan fyri at veita sokallað breiðbandsinternet í Føroyum, fær ikki størsta internetveitaran í landinum, Føroya Tele, upp á afturbeinini.

Føroyski internetveitarin metir tað nevniliga vera lítið sannlíkt, at tað fer at loysa seg hjá íslendsku fjarskiftisfyritøkuni at veita somu loysn í Føroyum, sum fyritøkan júst er farin undir at veita í Reykjavík.

Lina.net hevur farnu tvey árini lagt eitt fiburnet um alt Reykjavík og fer nú undir at bjóða reykjavíkingum at fáa annaðhvørt lagt fiburkaðal inn í stovuna ella at fáa samband við netið ígjøgnum streymkaðal.

Hendan loysnin gevur húsarhaldum møguleika fyri at fáa sera skjótt samband við internetið.

## Loysir seg ikki

Í blaðnum í gjár segði stjórin í Lina.net, Eiríkur Bragason, at ein av komandi verkætlanunum hjá fyritøkuni var at kanna, um tað kann loysa seg at veita somu loysn í einum ella fleiri av størru býunum í Føroyum.

Men tað kann tað neyvan, sambært Føroya Tele.

– Vit hava onkuntíð havt tankan frammi um at leggja fiburnet til dømis um allan høvuðsstaðin og geva viðskiftafólkunum beinleiðis atgongd til tað. Men tá vit so hava roknað eitt sindur upp á tað, er tankin lagdur til viks aftur. Tað hevði eftir okkara meting blivið so dýrt, at vit ikki høvdu fingið fólk at keypt tænastuna, sigur Hjallgrím Hentze, tekniskur leiðari á Føroya Tele.

## Eygleiða við áhuga

Men Føroya Tele avskrivar tó ikki møguleikan fyri, at støðan kann, og helst einaferð fer, at gerast ein onnur, og hugt verður við áhuga eftir, hvat íslendska fjarskiftisfyritøkan velur at gera í Føroyum.

Størsti føroyski fjarskiftisveitarin hevur tó ongar ætlanir um at fara undir eina kapprenning við Lina.net um at gerast tann fyrsta fyritøkan at bjóða út internetsamband um fiburnet.

– Hatta kann Lina.net sleppa at eiga fyri seg sjálvan fyri fyrst. Um fyritøkan velur at fara til verka í Føroyum, so ætla vit ikki at taka táttin upp eftir henni. Í hvussu er ikki í fyrstu atløgu, sigur tekniski leiðarin á Føroya Tele.

## TeleF trýr uppá tað

Billy Hansen, stjóri á fjarskiftisfyritøkuni TeleF, sum um stutta tíð fer at bjóða uppringt internetsamband út, hevur eina aðra áskoðan enn kappingarneytin Føroya Tele.

– Fyri nógvar brúkarar hevur ferðin á internetsambandinum mest at siga, og hesir hava einki ímóti at gjalda tvær ferðir so nógv fyri sambandið, um hetta er tvær ferðir so gott. Tí trúgvi eg at tað er ein marknaður her fyri tí slagi av internetsambandi, sum Lina.net bjóðar í Reykjavík, sigur stjórin á TeleF.

Her hugsar hann fyrst og fremst um fyritøkur av ymsum slag. Fyri privata brúkaran kann prísurin væl gerast ov høgur, ásannar stjórin á nýggju fjarskiftisfyritøkuni.

– Men tá tú hevur lagt ein fiburkaðal út til eina fyritøku, so kemur hann kanska framvið hundrað ella fleiri húsum, og tá nýtist tað ikki at vera so dýrt hjá hesum privatu brúkarunum at knýta seg í netið, sigur Billy Hansen, stjóri á TeleF.

## Samstarv við kommunu

Hann sær soleiðis fyri sær eina loysn, har kaðalar fyrst og fremst verða lagdir út til tær fyritøkur, ið ynskja tað, og at teir internetbrúkararnir, ið eru so hepnir at liggja framvið kaðalinum, so fáa møguleika at knýta seg til netið. Harumframt heldur hann at summi íbúðarøkir í landinum eru væl egnað at leggja ein slíkan kaðal út til. Men at leggja fiburkaðal undir allar vegirnar mitt í Havnini til dømis, kann skjótt gerast ein dýr og møtumikil søga, ásannar TeleF stjórin.

– Men í framtíðini fer eftirspurningurin eftir skjótum internetsambandi at vaksa, og tí fylgja vit gongdini við størsta áhuga.

Lina.net er eitt úrslit av samstarvi millum Reykjavíkar kommunu, el-veitaran og eina telefyritøku, og Billy Hansen sær fyri sær at eitt líknandi samstarv í kundi verið ein møguleiki í onkrum av størri býunum her á landi. Á tann hátt kundi arbeiðið at leggja fiburkaðalar verið gjørt bíligari og lættari.

Tekniski leiðarin á Føroya Tele er samdur i at eitt slíkt samstarv kann gera kaðalarbeiðið væl bíligari, og heldur at hetta er ein av høvuðsorsøkunum til, at tað hevur latið seg gjørt hjá Lina.net at leggja fiburkaðalar um alt Reykjavík so bíliga, sum tað er gjørt.

– Tað verður sagt at tað kostaði 120 milliónir at leggja fiburkaðalar um alt Reykjavík. Tað ljóðar óvanliga bíligt í mínum oyrum, og tað hevði neyvan latið seg gjørt uttan vælvild frá til dømis Reykjavíkar kommunu, sum er ein av eigarunum av Lina.net, sigur Hjallgrím Hentze.

TeleF hevur verið í sambandi við Lina.net, sum í næstum kemur til Føroya at kunna seg um umstøðurnar. Men sambært stjóranum TeleF, er einki formligt samband millum fyritøkurnar.


**Broytt avgreiðslutíð**

**Frá 1. februar 2001**

frá **09.30**
til **16.00**

Mánadag - fríggjadag
Telefonavgreiðsla er frá kl. 08.30

TRYGGINGARFELAGIÐ
FØROYAR
- so ert tú tryggari

Deildir okkara: Tórshavn 345 600 · Klaksvík 456 190 · Runavík 448 190
Miðvágur 333 090 · Tvøroyri 372 190 · Vágur 373 890